Landsbanki Føroya
GOVERNMENTAL BANK

# UPPRIT

8. APRÍL 2010

# FÍGGJARPOLITISK SKULDARHUGTØK

Í frágreiðingum frá ávikavist landsbankanum og búskaparráðnum hevur verið víst á, at tørvur er á fíggjarpolitiskum málsetningum. Ítøkiliga hevur verið víst á fíggjarpolitiskan høvuðsmálsetning, ið sigur, at skuldin hjá landi og kommunum undir einum á ongum sinni eigur at gerast størri enn upphædd, ið svarar til 40% av bruttotjóðarúrtøkuni.

Ógreiða tykist vera um skuldarhugtøk í sambandi við umrøðuna av fíggjarlógarkarmi fyri 2011 við tilhoyrandi inntøku- og útreiðslumetingum fyri árini fram til og við 2015. Roynt verður tí í hesum riti í stuttum at greiða frá skuldarhugtøkum av týdningi fyri fíggjarpolitikkin.

---

Skuldarhugtakið, sum búskaparráðið hevur hildið seg til í várfrágreiðing síni fyri 2010, er sett saman av bruttoskuld hjá landskassanum og kommunum, frádrigin gjaldføri í landsbankanum og peningastovnum. Her er talan um allýsing, sum minnir nógv um hugtakið "statsgæld", sum hevur verið nýtt í sambandi við danskan fíggjarpolitikk. Sambært hesum skuldarmáti, verða innlán hjá statinum í Danmarks Nationbank drigin frá bruttoskuldini.

Í talvuni niðanfyri, er gongdin í bruttoskuldini hjá landskassanum frádrigin gjaldføri í landsbankanum v.m. lýst í linju XI og XII. Skuldin í linju XI fyri 2011 verður her roknað sum skuld ultimo 2010 samantald við RLÚ fyri 2011. Tilsvarandi verður gjørt fyri fylgjandi ár. Í talvuni eru tøl viðvíkjandi BTÚ fram til og við 2008 tey, ið Hagstovan hevur gjørt upp. Tølini fyri árini 2009-2011 eru úr búskaparmyndli landsbankans, meðan tølini fyri 2012-2015 eru tey, ið Fíggjarmálaráðið hevur framskrivað (sí linju XIV).

Linja XII vísir, at skuldin hjá landskassanum frádrigin gjaldføri í landsbankanum v.m. veksur úr 20% í mun til BTÚ í 2010 til 35% í mun til BTÚ í 2015. Givið, at ætlaði tiltøk verða framd, og at framskrivingarfortreytir annars halda, er líkt til, at tað kann eydnast landskassanum at halda seg røttu megin skuldarhámarkið uppá 40% av BTÚ í nevnda tíðarskeiði. Her skal tó havast í huga, at skuldin hjá kommunala geiranum eisini eigur at verða tald við.

Vert er at leggja til merkis, at landsstýrið í metingum sínum letur skattastrýstið frá landskassanum minka frá 31,3% í mun til BTÚ í 2010 niður í 30,2% í mun til BTÚ í 2015 (sí linju VIII). Um inntøkurnar í framskrivingini (linja V) vóru gjørdar við óbroyttum skattatrýsti upp á 31,3%, vildi hallið í 2015 svarað til 1,9% av BTÚ heldur enn 2,9% av BTÚ, sum framskrivingin hjá landsstýrinum hevur við sær, og sum framgongur av linju VII í talvuni niðanfyri.

---

Mest nýtta skuldarhugtakið í dag um okkara leiðir, er tað, sum er galdandi í sambandi við búskaparliga og monetera samstarvið innan ES. Her verður bruttoskuldin hjá øllum tí almenna geiranum tald saman/konsoliderað. Innistandandi hjá tí almenna í sentralbankum og onnur likvid ogn verður ikki mótroknað skuldini.

Til ber at rokna seg til skuldarhámark eftir ES-leisti við at økja skuldarhámarkið, sum Búskaparráðið hevur víst á, úr 40% av BTÚ upp í 55% av BTÚ. Økingin svarar til vavið á gjaldførisgoymsluni, sum landið skal hava tøka í landsbankanum, og sum í minsta lagi eigur at svara til 15% av BTÚ.

Linja IX og X í talvuni niðanfyri vísa á leið gongdina fyri landskassan, um ES-skuldarhugtak varð nýtt. Her sæst, at skuldin við givnu fortreytunum í 2015 er økt upp í 50% í mun til BTÚ.

Skuldarhugtøkini omanfyri lýst, snúgva seg um sonevnda beinleiðis skuld. Tey eru lutfalsliga einføld og hóska seg vanliga væl til fíggjarpolitiskar málssetningar. Professionellir íleggjarar og ratingstovnar leggja tó mangan stóran dent á at lýsa skuld í breiðari høpi. Her verður serliga

hugsað um óbeinleiðis skuld, sum m.a. fevnir um framtíðar eftirlønarskyldur hjá tí almenna og veðhaldsskyldur.

| | Játtanarslag | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | FL 2010 | Ætlan 2011 | Ætlan 2012 | Ætlan 2013 | Ætlan 2014 | Ætlan 2015 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| I | Rakstrarjáttan | 2.088 | 2.194 | 2.387 | 2.620 | 2.647 | 2.817 | 2.842 | 2.876 | 2.939 | 2.958 | 2.994 |
| II | Løgujáttan | 201 | 268 | 292 | 232 | 184 | 181 | 188 | 225 | 224 | 225 | 225 |
| III | Lógarbundin játtan | 1.196 | 1.190 | 1.239 | 1.396 | 1.524 | 1.556 | 1.516 | 1.546 | 1.591 | 1.634 | 1.685 |
| IV | Stuðulsjáttan | 184 | 198 | -1.157 | 536 | 194 | 184 | 190 | 152 | 137 | 131 | 131 |
| V | Inntøkur (§ 20) | -3.457 | -4.523 | -4.205 | -4.153 | -3.862 | -3.958 | -4.092 | -4.165 | -4.312 | -4.451 | -4.596 |
| VI | RLÚ(2) | 211 | -674 | -1.443 | 630 | 688 | 780 | 645 | 634 | 579 | 498 | 439 |
| VII | RLÚ(2)/BTÚ | -2,0 | 5,8 | 11,6 | -5,1 | -5,6 | -6,2 | -4,9 | -4,7 | -4,1 | -3,4 | -2,9 |
| VIII | Inntøkur (§20) / BTÚ | -33,3 | -38,6 | -33,9 | -33,8 | -31,6 | -31,3 | -31,2 | -30,8 | -30,7 | -30,4 | -30,2 |
| IX | Skuld | 4.209 | 3.317 | 3.379 | 3.590 | 3.902 | 4.458 | 5.175 | 5.868 | 6.528 | 7.110 | 7.637 |
| X | Skuld/BTÚ í % | 41 | 28 | 27 | 29 | 32 | 35 | 39 | 43 | 46 | 49 | 50 |
| XI | Skuld frádrigin gjaldføri | 2.512 | 1.831 | 613 | 1.082 | 1.780 | 2.560 | 3.205 | 3.839 | 4.418 | 4.916 | 5.355 |
| XII | Skuld frádr. gjaldf./BTÚ í % | 24 | 16 | 5 | 9 | 15 | 20 | 24 | 28 | 31 | 34 | 35 |
| XIII | BTÚ | 10.380 | 11.716 | 12.402 | 12.301 | 12.240 | 12.650 | 13.130 | 13.524 | 14.065 | 14.627 | 15.213 |
| XIV | BTÚ: nom. vøkstur í % | 2,9 | 12,9 | 5,9 | -0,8 | -0,5 | 3,3 | 3,8 | 3,0 | 4,0 | 4,0 | 4,0 |

Landsbanki Føroya

GOVERNMENTAL BANK

Landsbanki Føroya | Yviri við Strond 15 | P.O.Box 229 | FO-110 Tórshavn | Faroe Islands | Tel. +298 350300 | Fax +298 350301
www.landsbankin.fo | landsbankin@landsbankin.fo | VTal: 382809